

www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 09 - 2012

# Oljuprísurin fellur framvegis

Prísurin á oljumarknaðunum í New York og London er aftur fallin í morgun, og oljan er nú umleið ein dollara bíligari, enn tá marknaðirnir lótu aftur í gjár. Marketwatch skrivar í morgun, at tað stóra prísfallið mánadagin og í gjár hevur lopið hvøkk á íleggjarar. Harafturat kemur, at oljugoymslurnar í USA vuksu nógv í síðstu viku. Greinarar hava framvegis ikki funnið orsøkina til, at oljuprísurin fall so nógv mánadagin, og at hann fall eitt sindur afturat seinnapartin í gjár. Summir halda, at prísurin fall aftan á óváttað tíðindi um, at Saudiarabia helt oljuprísin vera ov høgan, samstundis sum aðalskrivarin í OPEC segði, at tað er ríkiligt av olju á marknaðunum. Obama fylgir gongdini Tær amerikonsku oljugoymslurnar vuksu við 8,5 milliónum tunnum í síðstu viku, og tað var fleiri ferðir meiri, enn greinarar høvdu roknað við. Eitt nú hevði Bloomberg News mett, at goymslurnar vóru øktar eina millión tunnur. - Tann stóri vøksturin í teimum amerikonsku goymslunum kemst helst av, at framleiðslan er byrjað aftur á pallunum í Meksikoflógva eftir ta tropisku ódnina Isaac. Harafturat eru veikleikar at síggja í eftirspurninginum, sigur David Lennox, greinari hjá Fat Prophets í Sidney við Bloomberg News. Talsmenn fyri Hvítu Húsini í Washington søgdu á einum kunningarfundi í gjár, at myndugleikarnir halda eygað við oljumarknaðinum. Teir løgdu afturat, at forsetin letur framvegis allar møguleikar standa opnar, tá tað snýr seg um tann høga oljuprísin, og at hetta eisini umfatar møguleikan at koyra olju úr teimum strategisku goymslunum út á marknaðin.